

www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 06 - 2012

# Løgmaður - føroyskar sendistovur í Moskva og Bejing

Vit kanna, um møguleiki er fyri at seta á stovn føroyskar sendistovur í Moskva og Bejing, nú hetta eru vaksandi marknaðir fyri føroyskar vørur, og útlit eru til, at Rusland og Kina kunnu koma at gerast týdningarmiklir marknaðir fyri okkum í framtíðini. Hetta sigur Kaj Leo Johannessen, løgmaður við oljan.fo, nú eftir at hann hevur hitt týðandi umboð fyri kinesiskar myndugleikar og vinnulív. Løgmaður heldur vit eiga at umhugsa at senda eina sendinevnd við vinnulívsfólki til Kina at kanna møguleikarnar fyri at menna útflutningin av føroyskum vørum til Kina. Hann vísir á, at vit nøkur ár herfyri gjørdu eitt líknandi tiltak í India. Kaj Leo Johannessen fegnast um, at samvinna millum Føroyar og Kina kann koma á breddan og dylur ikki fyri, at kongaligi døgurðin í Danmark fyri kinesisku forsetahjúnunum, har løgmaður var við, hevur givið ikki sørt av nýggjum íblástri. Ì hesum døgum, um sama mundið sum ein kinverskur boripallur setur á føroysku undirgrundina, vitjar ein kinversk sendinevnd í Føroyum fyri at tosa um vinnusamstarv her serstakliga á aliøkinum. Men høvi verður eisini hjá sendinevndini at tosa við landsstýrið og umboð fyri Vinnuhúsið komandi dagarnar. Johan Dahl, vinnumálaráðharri segði við oljan.fo í gjár, at hann ætlar eisini at umrøða oljuleitingina við Føroyar og møguleikarnar fyri samvinnu á oljuøkinum millum londini. Mynd Um somu tíð sum kinverskur boripallur setir á føroysku undirgrunda, vitjar kinversk sendinevnd í Føroyum fyri at tosa um v innusamstarv millum londini.